# VB fekk hevnd og trý stig

*VB byrjaði landskappingina við einum sigri, tá teir í grannauppgerðini vunnu 2-1 á Sumba, so eftir øllum at døma mugu sumbingar í ár leita aðrar leiðir eftir neyðugu stigunum*



*Í ár má Sumba leita nýggjar leiðir eftir stigunum. Í øllum førum fáa teir ikki seks slík frá VB*

***Mynd: Áki Bertholdsen***

Jákup Mørk

Sum vera man vóru vágbingar spentir, nú fyrsti landskappingardysturin á hesum sinni stóð fyri framman.

Undan kappingarársbyrjan tosaðu vágbingarnir um, at teir ætlaðu at betra um endastøðuna frá undanfarna ári, og allarhelst vildu teir eisini syrgja fyri, at byrjanin av árinum ikki gjørdist eins soltin og undanfarna ár.

VB hevði nevnliga eina katastrofala byrjan upp á kappingarárið í fjør, men takka verið einari góðari seinnu hálvu, eydnaðist tað teimum kortini at vinna seg upp á eitt sætta pláss.

Fyrsta forðingin á hesum sinni var so grannauppgerðin móti Sumba, og einki er at taka seg aftur í, at VB her átti hevnd til góðar. Sumba vann nevnliga báðar grannauppgerðirnar í fjør, og tá hetta samstundis vóru einastu dystir, sum Sumba vann, er einki at siga til, at VB leikararnir vóru sera uppsettir til at vinna dystin.

### VB trýstið

Tað var eisini sjónligt allan fyrra hálvleik, at VB ætlaði sær bæði stigini við aftur av Krossinum. Sum tað skilst har suðuri frá, so høvdu vágbingarnir greiða leikliga yvirvág fyrstu trý korterini, og fleiri ferðir var eisini um reppið at teir skoraðu.

Mál kom tó bert tað eina henda fyrsta hálvleikin. Hetta hendi um miðjan hálvleikin, tá leikandi venjarin, Kristof Popzynzki, slapp sær ígjøgnum í vinstru síðu. Komin oman móti baklinjuniu legði hann bóltin útfrá, og har kom Jón Pauli Olsen og sendi bóltin inn við nærmasta stólpa.

Bæði Milan Kuljic og leikandi venjarin høvdu seinni møguleika at økja um leiðsluna, men sumbingar sluppu í báðum førum við hvøkkinum, soleiðis at bert eittans mál skildi partarnar í hálvleikssteðginum.

### Komu betri við

Í mun til dystin leygardagin millum somu lið, var Sumba rættuliga nógv umskipað. Ta ferðina sótu nakrir av stuðulsleikarunum á beinkinum, soleiðis at teri vóru ómóðir, nú talan var um týdningarmikil stig í landskappingini.

VB hevði hinvegin so at siga sama fólki, og kanska var hetta eisini viðvirkandi til, at sumbingarnir komu nógv betur við í seinna hálvleiki. Eisini høvdu teir lítla lotið við sær í seinna hálvleiki.

Talan gjørdist nú um ein nógv javnari dyst, og tá seinni hálvleikur var á leið hálvrunnin megnaðu sumbingarnir eisini at skapa javnvág í málskjótingini. Hetta hendi eftir hornaspark, sum varð skotið móti nærmastu stong. VB málverjin royndi at boksa bóltin burtur, men ístaðin støkk bólturin á tvørtræðið, og so var Trygvi Nielsen fyrstur at setta kollin undir.

Frøin var sjálvandi stór á sumbingum eftir javnandi málið, men løtan var teimum kanska nakað stokkut. Tað gingu nevnliga bert tveir minuttir, so hevði VB aftur lagt seg á odda.

Hornaspark varð skotið úr høgru, og eftir at Jón Pauli hevði stútað á tvørtræið, var Robert Cieslewicz fyrstur á returinum og sendi bóltin í netið.

Seinastu 20 minuttirnar royndu sumbingar at trýsta spælið longur niðan á vøllin, og ta einu ferðina høvdu teir eisini bóltin í meskunum, men Eirikur Joensen var rangstaddur, og so varð málið av ongum. Eisini hevði Hans Jacob Thomsen ein stóran møguleika, men skotið endaði væl omanfyri málið.

### Sumba ov verjukent

Vágbingar fingu sostatt stigini, sum teir vóru farnir suður eftir, so útlitini fyri einum líkinda kappingarári eru kanska slettis ikki so galin hjá teimum.

Hópurin tykist vera bæði breiðari og sterkari enn í fjør, og líkt er til, at tilgogndin í Robert Cieslewicz og Predrag Zivkovic hevur verið rættuliga munagóð.

Sumbingar mugu helst aftur í ár sanna, at hjá teimum ræður tað fyrst og fremst um at halda sær í deildini. Í fjør var tað ein munandi hjálp í hesum stríðið, at tað eydnaðist at vinna øll stigini móti grannunum fyri norðan, men longu nú er so greitt, at teir mugu vera í hvussu so er trý av hesum fyri uttan.

Úr Sumba frættist annars, at fleiri vóru av teirri áskoðan, at liðið leikti alt ov verjukent í dystinum. Onkur vildi eisini vera við, at tað var hetta, sum var størsta orsøkin til tapið. Hvussu var og ikki, so er tað í øllum førum ein sannroynd, at fleiri av teimum leikarum, sum vanliga teljast millum stuðulsleikararnar á liðnum (Jan Poulsen, Birgir Jørgensen, Marlon Kjærbo, Eirikur Joensen og Sonne Kjærbo), máttu taka til takkar við einum sessi á beinkinum.

**Sumba-VB 1-2 (0-1)**

0-1 Jón Pauli Olsen 24.
1-1 Trygvi Nielsen 68.
1-2 Robert Cieslewicz 70.

Dómari: Birgir Sondum

**Sumba:**

Eigil Olsen - Mortan úr Hørg, Spasojé Biberdzic, Dánjal Johan Joensen, Trygvi Nielsen - Hallur Dam Joensen, Hans Jacob Thomsen, Nikola Biberdzic, Sasa Tomajek, Bergur Vinther - René Thomsen

**VB:**

Bjarni Johansen - Predrag Zivkovic, Janus Kjærbo, Eyðun Jacobsen, Eyðun Kjærbo, Tórður Holm, Milan Kuljic, Michael í Lágabø, Jón Pauli Olsen - Robert Cieslewicz, Kristof Popzynzki

# Stigini av Sandi til Havnar

*HB fekk øll stigini heim við aftur, tá teir mánadagin vitjaðu á Sandi, men sandoyingar munnu helst iðra seg um, at teir enn einaferð taptu tepurt*

Jákup Mørk

Síðani B71 fyri góðum tíggju árum síðani trein inn á føroyska fyrstudeildarpallin, hava dystirnir móti HB altíð verði at rokna sum nakað serligt. Tað vóru nevnliga HB og B71, sum í 1989 stríddust um fremsta plássið í deildini. Eitt stríð, sum B71 vann, og ta ferðina rundaðu sandoyingarnir av við at buka HB liðið heima á Sandi.

Ikki tí, nógv er broytt seinastu tíggju árini, og sandoyingar mugu í dag ásanna, at tað er langur vegur til steyp og heiðursmerki, men kortini er altíð spenningur í luftini, tá liðið fer á vøllin, og tað serliga tá HB er mótstøðuliðið.

Hesu ferð var ikki talan um seinasta, men hinvegin fyrsta, landskappingardystin á árinum, og móti einum HB liðið, sum var nærum spildurnýtt, sammett við tað, sum B71 tapti stórt fyri í seinasta dystinum í fjør, skuldu sandoyingarnir sostatt upp til fyrstu av teimum 18 próvtøkunum, sum liggja fyri framman.

### HB trýsti

Í fyrra hálvleiki var tó ikki so øgiliga nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um ein spennandi dyst. HB sat á tí mesta, og í mun til dystin móti GÍ leygardagin, gekk spælið bæði betri og skjótari.

Vindin høvdu havnarmenninir eisini við sær, og hetta viðførdi, at spælið meira ella minni varð trýst oman á sandoyarhálvuna.

Nakrir málmøguleikar spurdust eisini burturúr, men B71 hevur sum vant ein tryggan pólskan aftasta skansa, og Waldemar Nowicki tók sær eisini av royndunum frá HB liðnum. Størsta møguleikan fekk Jón Rói Jacobsen, tá hann fekk fatur á bóltinum, eftir at B71 verjan hevði verið heldur sløsut, men onkursvegna fek pólverjin fatur á bóltinum, hóast Ungi HB leikarin einans var staddur fáar metrar frá málinum.

B71 royndi í sínum lag at fáa gongd á kontraspælið, sum fyrr var vørumerkið hjá liðnum, men fyrstu trý korterini fingu teir ongantíð skapt nakrar serliga vandamiklar støður í hinum endanum.

### Javnari

Seinna umfarið vóru tað sandoyingarnir, sum høvdu vindin í ryggin, og skjótt varð eisini greitt, at teir nú eisini vildu sleppa upp í part at mynda spælið.

Kanska var tað framvegis HB, sum átti vandamesta spælið, men nú vóru teir ikki eins einaráðandi, og teir vóru fyrra umfarið.

Tað eydnaðist tó havnarmonnunum at skjota avgerandi málið rættuliga tíðliga í seinna hálvleiki. Hetta kom eftir at Hallur Danielsen royndi seg við einum skoti úr 20 metra fjarstøðu. Bólturin tók í beinið á B71 verjuleikara, og so var Waldemar prísgivin.

Sandoyingar royndu tað teir vóru mentir at skapa javnvág í málskjótingina, og onkuntíð var eisini hampuliga nær við. HB megnaði tó at halda tætt allan dystin á tamb, og so vóru fyrstu trý stigini veruleiki.

### Góðar vónir

Við dystunum hjá HB í steypakappingini í huga, so var kanska væntandi, at sigursvanda høvuðsstaðarfelagið fór at hava eitt sera trupult kappingarár fyri framman, har tað mest av øllum ráddi um, at byggja eitt nýtt lið upp.

Úrslitini hava eisini verið heldur misjøvn í bólkaspælinum, men við sigrinum á B71 fingu ungu leikararnir í øllum førum eitt sindur av luft, soleiðis at trýstið og kravið um trý stig, ikki verður heilt so stórt komandi vikuskiftið, tá KÍ kemur á vitjan.

Sum skilst á lagnum, so vóru HB leikararnir eisini væl nøgdir við tað spæl, sum teir sýndu í fyrra hálvleiki, so kanska er ein grundað vón um, at HB eisini í ár fer at teljast millum liðini, sum fara at stríðast um heiðursmerkjaplássini.

Hjá sandoyingunum er støðan eitt sindur øðrvísi. Í fjør noyddist liðið fleiri ferð at taka til takkar við teprum tapi, og dystirnir í steypakappingini hava givið ábendingar um júst sama fyribrigdi. Helst er tað tó ein spurningur um tíð, áðrenn B71 fær marginalarnar í sín part, men hinvegin er eisini alneyðugt, at tað ikki gongur ov long tíð, áðrenn so verður, tí mál teirra er at betra um áttanda plássið, sum liðið vann sær í fjør.

**B71-HB 0-1 (0-0)**

0-1 Hallur Danielsen 54.

Dómari: Petur Reinert

**B71:**

Waldemar Nowicki - Bernhard Petersen, Jón Brekku, Bergleif Sólsker - Bjørn Thorsteinsson, Kári Nielsen, Eli Hentze, Rúni í Soylu, Jógvan Jón Petersen - Kristian Nielsen, Høgni Hansen

**HB:**

Bárður Johannesen - Jóhannis Joensen, Florin Miháescu, Hans á Lag, Janus Joensen - Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Gheorghe Ciure, Símun Eliasen - Bárður Mortansson, Jón Rói Jacobsen



# Óli og Jákup ikki við í Liktinstein

*Landsliðið: Jens Martin Knudsen spælir í kvøld sín 50. altjóða skrásetta landsdystin*

Tveir av landsliðsspælarunum, sum mugu roknast at vera í best fyri, eru ikki við í Liktinstein. Talan er um Óli Johannesen og Jákup Mikkelsen. Óli Johannesen varð skaddur undir venjing fyri knøppum tveimum vikum síðani. Tað hevur víst seg at taka longri tíð, enn teir í fyrstu atløgu høvdu vónað, at fáa bilbukt við skaðan. Óli Johannesen hevur ikki fingið vant, og tí var tað longu skírisdag greitt, at tað fór ikki at bera til hjá Óla at spæla við landsliðnum í kvøld.

Jákup Mikkelsen vardi 1. páskadag málið hjá Herfølge í 1. hálvleiki móti AGF. Men eftir steðgin kom Jákup ikki aftur á vøllin, og seinni hava vit frætt, at Jákup í 1. hálvleiki spældi við skaddum ælboga.

Longu undir upphitingini dragnaði okkurt í ælboganum, og sum 1. hálvleikur leið var skaðin so mikið meinur, at tað var ikki hugsningur um at spæla í 2. hálvleiki.

Á páskum bar ikki til at fáa nakra viðgerð fyri skaðan. Jákup, sum 1. páskakvøld gav avboð til Allan Simonsen, ið var staddur í Føroyum, skuldi í gjárkvøldið undir læknahond, og teir í Herfølge vóna, at hann verður klárur, tá teir sunnudagin skulu spæla toppdyst í Brøndby.

### Jens Martin 50

Landsdysturin í Liktinstein í kvøld er tann 66. altjóða skrásetti, síðani FSF í 1988 fekk limaskap í FIFA. Síðani tá hava 69 føroyingar verið á fótbóltslandsliðnum. Flest landsdystir hevur Jens Martin Knudsen spælt.
Hesa ferð er Jens Martin einsamallur málverji í ferðalagnum, og tí er tað frammanundan greitt, at tað verður spælandi venjarin hjá Leiftri, sum skal verja málið. Og tað fer Jens Martin at gera fyri 50. ferð á landsliðnum. Jens Martin, sum tá var 21 ára gamal, vardi málið í fyrsta dystinum, sum var í Akranesi 24. august í 1988. Ta ferðina taptu føroyingar 1–0, og í teimum 49 dystunum, sum Jens Martin higartil hevur spælt, hevur hann verið 135 ferðir í netinum eftir bóltinum.

Nú er Jens Martin 33 ára gamal. Hann hevur onkuntíð sagt, at hann fór ikki at gerast gamal á beinkinum, um Jákup Mikkelsen fór at verða málverji hvørja ferð. Hvussu tað verður við hesum, eru ongar ábendingar komnar um enn.



*Gongst eftir ætlan spælir John Petersen sín 50. altjóða skrásetta landsdyst í kvøld*

Jens Martin vardi føroyska málið í fyrsta EM undankappingardystinum, sum í fyrraárið var í Estlandi. Tá varð hann útvístur, og so hevði Jákup plássið inntil síðsta heyst. Eitt sindur óvæntað var tað, at Allan Simonsen gav Jens Martini plássið í Kekkia, men tað boðaði frá, at venjarin framvegis roknar veteranin, sum er elsti føroyski spælarin, at vera innarlaga í hópinum.

John Petersen verður í kvøld átjandi føroyski spælarin, sum røkkur 25 landsdystum. Allan Mørkøre spælir í kvøld fyri 49. ferð á landsliðnum, og Todi Jónsson, Øssur Hansen og Jan Dam røkka í kvøld 39 landsdystum.

JH

# Liktinstein er sum dagur og nátt

*Mótstøðuliðið: Úrslitini hjá lítla landinum í Alpunum hava verið nógv betri á heimavølli, enn tey hava verið á útivølli*

Í kvøld skal føroyska landsliðið spæla venjingardyst móti Liktinstein. Á teimum 160 ferkilometrunum á markinum millum Sveis og Eysturríki búgva 28.000 fólk.

Liktinstein hevur síðani 1974 verið limur í altjóða fótbóltssamgonguni. Bara eitt felag umboðar landið í Europa Cup. Tað er tað liðið, sum vinnur steypakappingina. Higartil hevur tað ikki verið skipað fyri nakrari landskapping, men tað verður arbeitt við málinum. Tað eru sjey fótbóltsfeløg í Liktinstein, og tey taka lut í lægru deildunum í Sveis.

### Vunnu á Kina

Í áttati árunum spældi landsliðið hjá teimum fleiri ferðir vinardystir, serliga móti Sveis, sum teir altíð taptu nógv ímóti. Fyrsta altjóða kappingin, sum teir tóku lut í, var undankappingin til olympisku leikirnar í Los Angeles í 1984. Teir spældu móti Sveis og taptu 3–1 á heimavølli og 3–0 á útivølli.

Fyrstu ferð teir vóru við í undankapping var í sambandi við EM í 1996. Fyrsti dysturin var í apríl í 1994 í Belfast, og Norðurírland vann 4–1.

Í 1995 vunnu megnaðu teir málleysan javnleik á heimavølli móti írlandi. Hetta var einasta stigið, sum teir fingu í undankappingini til EM í 1996. Í HM undankappingini til HM í 1998 fingu teir einki stig, men í síðstu EM undankappingini fingu teir fýra stig. Ta ferðina vunnu teir 2–1 á heimavølli móti Aserbadjan og greiddu málleysan javnleik móti Ungarn.

At talan er um heilt ymisk úrslit á heimavølli og á útivølli sæst á, at teir taptu 5–0 í Ungarn og 4–0 í Aserbadjan.

Liktinstein hevur bara tvær ferðir vunnið. Umframt á Aserbadjan hava teir vunnið á Kina. Sjálvsagt stóðst nógv umrøða av, at heimsins fólkaríkasta tjóð tapti ein landsdyst móti einari av minstu tjóðunum í heiminum.

Dysturin varð spældur í Malaysia, og Liktinstein vann 2–0.

Í kvøld fara Føroyar og Liktinstein at dystast í høvuðsstaðnum – Vaduz. Stadion nevnist Rheins Pak stadion, og tað er rættuliga nýtt. Higartil hava teir spælt heimadystirnar í lílta býnum Eschen, sum liggur norðanfyri høvuðsstaðnin.

JH



# Ov lítið pláss í flogfarinum

*Landsliðið: Fótbóltssambandið hevði ikki roknað við, at landsliðsspælararnir, sum dagliga eru í Íslandi, skuldu ferðast úr Føroyum*

Tað var trongligt, tá landsliðsferðalagið fyrrapartin í gjár fór av landinum við flogfarinum hjá Atlantsflog.

Ferðslan millum Føroyar og Danmark er nógv í hesum døgum, tí tey eru mong, sum hava verið heima í páskafrí. Nú skulu øll hesi upp á pláss aftur.

Fótbóltssambandið bílegði í góðari tíð ferðaseðlar til teirra, sum skuldu við landsliðnum niður til Liktinstein. Men í páskavikuni stakk ein trupulleiki seg upp.

Fimm spælarar í landsliðsferðalagnum spæla fótbólt í Íslandi. Í FSF høvdu teir einki hoyrt, og tí høvdu teir roknað við, at hesir vóru í Íslandi á páskum, og at teir tískil skuldu ferðast úr Keflavík og síðani úr Keypmannahavn saman við teimum, sum komu úr Noregi, Føroyum og Danmark.

Skírisdag vísti tað seg, at allir landsliðsspælarnir í íslendskum fótbólti – Uni Arge, Henning Jarnskor, Sámal Joensen, Allan Mørkøre og Jens Martin Knudsen – vóru komnir til Føroya at halda páskir, eftir at teir høvdu verið í Spania á venjingarlegu. Tað vildi við øðrum orðum siga, at páskadagarnar hevur verið arbeitt við at fáa pláss í flúgvaranum til spælararnar.

Støðan hevði í fyrstu atløgu við sær, at eingin spælari varð úttikin fyri Óla Johannesen, tá hann gav avboð, og eingin málverji varð úttikin fyri Jákup Mikkelsen, tá hann gav avboð.

Tá landsliðsferðalagið fyrrapartin í gjár fór vestur í Vágar, vóru tveir av spælarunum framvegis á bíðilista. Tá flogfarið lætti úr Vágum var hetta broytt, soleiðis at allir komu við í flogfarið. Tað vil við øðrum orðum siga, at 16 spælarar eru við í Liktinstein, og eru hesir: Jóhannis Joensen úr HB, Henning Jarnskor úr GÍ, Øssur Hansen, Jan Dam og Fróði Benjaminsen úr B68, Jens Kristian Hansen, John Petersen og Jákup á Borg úr B36, Rógvi Jacobsen úr KÍ, Jens Martin Knudsen og Sámal Joensen úr Leiftur, Todi Jónsson úr FCK, Julian Jónsson og Kurt Mørkøre úr Sogndal, Uni Arge úr Akranes og Allan Mørkøre úr ÍBV.

Dysturin verður spældur kl. 18.30 lokala tíð, sum svarar til 17.30 føroyska tíð.

Umframt Sosialin er Útvarp Føroya á staðnum, og í fríggjadagsblaðnum frættist meira frá dystinum.

JH